Tíðindablaðið sosialurin Telefon 311820 Telefax 314720 Internetadressa: www.sosialurin.fo e–mail: post@sosialurin.fo

# Hvør minuttur var undirhaldandi

*Allan Simonsen hevur lyft føroyskan fótbólt upp á altjóða støði*

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

Nú er føroyskur fótbóltur betri, annarleiðis og eggjandi. Ein vanligan gerandisdag í 1992 sat undirritaði á Svangaskarði á Toftum, og hugdi fyri fyrstu ferð eftir einum landsdysti, har føroyingar vóru annað liðið. Veðrið var av tí fagrasta, og tað var ein løgin kensla at sita soleiðis uppi í fjøllunum og hyggja eftir fótbólti. Alt var løgið. Meina búskaparliga kreppan var við at eta føroyska samfelagið upp innan frá, mergurin var næstan horvið, og føroyingar blivu so væl og virðiliga flongdir av belgiumonnum, sum áttu homlubandið hendan dagin. Eg spurdi meg sjálvan fleiri ferðir hendan dagin, hvat føroyingar gjørdu í altjóða. Tað var eyðmýkjandi bæði fyri spælarar og okkum føroyingar sum fólk. Og lítið hjálpti, at føroysku fjølmiðlarnir gjørdu sítt, alt teir vóru førir fyri at burturforklára, at føroyingar ikki dugdu at spæla fótbólt móti rættuligum fótbóltsspælarum.

Men tey, sum trúðu upp á føroyskan fótbólt í altjóða høpi fyri átta árum síðan fingu rætt, og vit ivandi vóru dyggiliga gjørd til skammar. Sjálvur havi eg verið uttanlendis í nøkur ár og eg var heilt ovfarin av føroyingum á Tórsvølli mikukvøldið.

Allan Simonsen, landsliðsvenjari, hevur lyft føroyskan fótbólt upp á altjóða støði. Eg var staddur í pressulosjuni á Tórsvølli mikukvøldið, og í steðginum spurdi tíðindamaðurin hjá DR, danska útvarpinum, ein tíðindamann hjá tíðindastovuni Ritzau, hvat hann helt um fyrra hálvleik, sum endaði við javnleiki. »Jeg synes, at Allan Simonsen har klaret det langt bedre end Morten Olsen«, var hansara stutta viðmerking.



*Danskur tíðindamaður helt at Allan Simonsen kláraði seg betri enn Morten Olsen í fyrra hálvleiki*
***Mynd:** Álvur Haraldsen*

Eisini tá danir fóru at skjóta mál í seinna hálvleiki, góvust føroyingar ikki á hondum. Teir vóru ágrýtnir og vóru mangan við danska málið. Áskoðarin fekk valuta fyri hvørt oyra, hann hevði latið til atgongumerkið, og tað fløvaði at síggja, hvussu væl føroysku áskoðararnir dugdu at uppføra seg og at ongin togtogan gjørdist millum føroyingar og danir. Rættuliga nógvir danir vóru millum teir 6400 áskoðararnar á Tórsvølli mikukvøldi.

Tórsvøllur er ikki heilt liðugur enn, men hann er væl brúkiligur til landsdystir og tað er ein deilig kensla, tá íð 14 prosent av øllum føroyingum eru savnaði á einum stað og saman við hornorkestrinum syngja fyrsta ørindi at tjóðsanginum.

Føroyska landsliðið er ikki longur við fyri at læra. Liðið hevur lært og eg sendi Allan Simonsen fleiri takksamar tankar mikukvøldið. Eg ætli mær á komandi landsdyst næstu ferð.

# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og fyrrapartin regn, annars sólglottar, men okkurt ælið. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvssgul av eystri og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Fleyr till gul av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 9 og 13 stig.




Lágtrýstið í landnyrðing úr Føroyum fer í útsynning og hevur regn við sær.




Lágtrýstið við Føroyar hvørvur í útsynning. Hátrýstið yvir Atlantshavinum við einum ryggi til Grønlands fer eystureftir og gevur góðveður um vikuskifti.




**Hitalagið mált frá 16./08. kl 06⁰⁰–17./08. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,6°C**
Minsti hiti máldur í august: **0,2°** Mesti hiti máldur í august: **22,0°**




Avfallið: <0,1 mm – **mált frá 16./08. kl 6⁰⁰–17./08. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í august: 52,4 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 20 |
| Tromsø | 15 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannahavn | 20 |
| Helsinki | 14 |
| Moskva | 20 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 25 |
| Kiev | 26 |
| Bukarest | 30 |
| Paris | 26 |
| Madrid | 33 |
| Róm | 30 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 30 |
| Malta | 32 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 13 |
| New York | 29 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 25 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 20 |

## Vestfalskyrrindi

11. aug.: Mánin longst frá jørðini
15. aug.: Fullmáni
22. aug.: Seinna kvarter
27. aug.: Mánin næstur jørðini

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. aug. | 09.07 | 21.23 | 08.07 | 20.23 | 08.22 | 20.38 | 11.07 | 23.23 | – | 12.07 | 07.22 | 19.38 | 06.22 | 18.38 | 09.22 | 21.38 | 10.22 | 22.38 | 08.52 | 21.08 | 10.07 | 22.23 |
| 19. aug. | 09.38 | 21.57 | 08.38 | 20.57 | 08.53 | 21.12 | 11.38 | 23.57 | 00.23 | 12.38 | 07.53 | 20.12 | 06.53 | 19.12 | 09.53 | 22.12 | 10.53 | 23.12 | 09.23 | 21.42 | 10.38 | 22.57 |
| 20. aug. | 10.14 | 22.33 | 09.14 | 21.33 | 09.29 | 21.48 | – | 12.14 | 00.57 | 13.14 | 08.29 | 20.48 | 07.29 | 19.48 | 10.29 | 22.48 | 11.29 | 23.48 | 09.59 | 22.18 | 11.14 | 23.33 |
| 21. aug. | 10.52 | 23.15 | 09.52 | 22.15 | 10.07 | 22.30 | 00.33 | 12.52 | 01.33 | 13.52 | 09.07 | 21.30 | 08.07 | 20.30 | 11.07 | 23.30 | – | 12.07 | 10.37 | 23.00 | 11.52 | – |

Kelda: Skipalistin 2000

sosialurin Altíð fyrst við
www.sosialurin.fo